tíðindablaðið **sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakkstein, Niclas Johannesen
**Yngd:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon.** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Ógjørligt?

## *Oddagrein*

LANDSSTÝRISMAÐURIN í Vinnumálum sigur, at tað er ógjørligt at bora undirsjóvartunnilin undir Vestmannasund uttan partafelag. Ein kann undrast á, hvussu tunnlar eru gjørdir fyrr í Føroyum. Tað ber illa til, at ein landsstýrismaður stendur og sigur fyri Føroya fólki, at um tunnilin ikki verður gjørdur eftir hansara høvdi, so verður als eingin tunnil gjørdur. Um Løgtingið samtykkir, at Landsverkfrøðingurin skal standa fyri arbeiðnum, so hevur Finnbogi Arge bert tvey í at velja: antin letur hann Landsverkfrøðingin gera arbeiðið, soleiðis sum Tingið hevur álagt honum og gloymir alt um P/F Vágatunnilin, ella noyðist hann at takka fyri seg.

ÚTSØGNIRNAR frá Finnboga Arge eru júst tað, ið vit fyrr hava ávarað ímóti. Hann roynir at fyrigykla fólki, at tað at niðurstemma anleggslógina er tað sama sum at atkvøða ímóti undirsjóvartunnilinum. Tað er sjálvsagt ikki so, eftirsum tingið prinsipielt kann avtaka eitthvørt íløguloft og lata Landsverkfrøðinginum uppgávuna. Spurningurin er, um trupul-leikin ikki er ein heilt annar. FA hevur longu nú latið P/F Vágatunnilin gjørt nakað av arbeiði samstundis sum hann hevur avhøvdað stovnin, ið av røttum skuldi staðið fyri arbeiðnum. Tað hevði verið ikki sørt pínligt, um Finnbogi Arge nú fekk álagt av tinginum at upploysa P/F Vágatunnilin og geva Landsverkfrøðinginum tað, ið av røttum alla tíðina átti at verið teirra projekt. Ein landstýrismaður og umsiting hansara eiga at fylgja tingsins vilja, hóast hesin vilji viðhvørt kann ganga ímóti ideologiskum hugsanum ella tvangstankum. Nú vita vit sjálvsagt, at umsitingin er ópolitisk og tí ikki tvíheldur um eitt nú partafelagsformin, um tingsins vilji er øðrvísi. Umsitingin eigur at kunna arbeiða líka væl og professionelt óansæð hvat politiska rákið er. Letur ting-ið Landsverkfrøðingin standa fyri arbeiðnum, so hevur borgarin framvegis alment innlit, meðan hetta ikki er støðan viðvíkjandi einum almennum partafelag. Tað hevði verið eitt sindur løgið, um største almenna føroyska annlegsarbeiðið seinastu nógvu árini ikki verður skipað soleiðis, at borgarin, ið hóast alt skal rinda, fær høvi at fáa alment innlit í projektið.

FORKLÁRINGSTRUPULLEIKIN hjá Finnboga Arge viðvíkjandi sínum dispositionum mótvegis Landsverkfrøðinginum verður sjálvsagt ógvuliga stórur, um anlegslógin hjá honum fellir. Vónandi gloyma tinglimir ikki, at ein skipaður almennur infrastrukturur hóast alt er meira týdningarmikil enn ein fyribyrging av einari pínligari støðu fyri Finnboga Arge. Formaðurin í Vinnunevndini hevur ivaleyst rætt, tá hann sigur, at ein atkvøða fyri anlegslógini hjá Finnboga Arge er tað sama sum ein blástempling av framferð Vinnumálastýrisins mótvegis Landsverkfrøðinginum.

***Sosialurin***

**Viðmerking:**

# Ferðsludeyðin tíggju faldaður í ungdomsárunum

*– Tað ber ikki til, at Føroyar sum ein mentað tjóð, og at vit sum ábyrgdarfull vaksin, kunnu lata so nógv ung lív og lagnur fara fyri skjeyti, skrivar Høgni Djurhuus, yvirlækni, í áhugaverdum sjónarmiði um ferðsludeyða*

*Áheitan til Rættarnevnd Føroya Løgtings*

Nú eitt ár aftur er runnið verður gjørt upp hvussu nógv eru deyð, og hvussu nógv hava fingið skaðar av ferðsluávum seinasta árið. Tíanverri sæst eingin broyting í mynstrinum og talinum enn (7 deyð harav 4 átjan nýtjan ára gomul).

Tað eru serliga tvær orsøkir, sum fáa meg til at skriva hesar reglur. Fyrsta er tað hjálparloysið, sum man mangan kennir, tá vit sum viðgerðarfólk standa við teimum avvarðandi hjá einum ungum menniskja, sum júst er deytt eftir bilavanlukku.

Tað er sera trupult at ugga hesi fólkini, tí tað er eingin meining í hesum tilburði. Seinra er, at tað ber til at gera nakað við hetta uttan kostna bert við lógaráseting.

Vit liva í einum samfelag, har bilaferðsla er neyðug, og av henni standast av og á vanlukkur, sum hava miss av mannalívi við sær, hesum slepst allarhelst ikki undan. Men tað sum sýnist mær óneyðugt spill av ungum monnum og kvinnum eigur at kunna fyribyrgjast betur enn í dag.

Fyri at lýsa, hvussu ymist ferðsludeyðin rakar, vil eg vísa tvær strikumyndir, onnur er úr Føroyum: Hon vísir talið av teimum deyðu í mun til aldurin í 15 ár (1978-1993), og hin úr Danmark, sum vísir talið av ringum heilaskaðum í mun til aldur og kyn í tveimum tíðarskeiðum.

Sum tað sæst, reisir ein tindur seg burtur úr, tað er aldursbólkurin 15-25 ár við tí hægsta punktinum svarandi til 18 ár. Vandin fyri at doyggja av ferðsluávum í hesum ungdómsárum er í Føroym tíggju fald í mun til aðrar aldursbólkar, og í Danmark er vandin fyri at fáa ringt mein av somu orsøk í hesum árum 3 til 4 fald.

Á strikumyndini úr Danmark sæst, at genturnar fáa skaðarnar 1-2 ár fyrri enn dreingirnir, allarhelst tí tær eru komnar upp í bilin hjá teimum eitt sindur eldru dreingunum.

Hetta eru døpur og ræðandi tøl, sum tað enn í Føroyum ikki hevur borið til at broyta, og eg stúri fyri komandi ári við somu ferðsluvannlukkum, somu unglingum og somu foreldrum, sum vit ikki kunnu hjálpa og ugga.

Men tað ber til at bøta um so, at vanlukkurnar og skaðarnir gerast færri, tað sæst eisini á strikumyndini við heilaskaðum. Har sæst, at skaðarnir eru minkaðir við einum triðjingi frá 1978 — 1980 til 1991 — 1993, tí at mesta ferðin er minkað og lóg um tvungið bilbelti er komin í millumbilinum, hesi tiltøk hava givið sjónligar broytingar.

Hvat ber til at gera í Føroyum? Sum tað skilst er nýggj ferðslulóg í umbúna, og tað er hóskandi høvi til at gera broytingar til at verja hesi ungu fólkini.

Eg haldi, at tað sum hevði gjørt stórsta mun, er ein avmarking í koyrikortinum tey fyrstu árini.

Hetta verður brúkt aðrastaðni. Eisini er tað galdandi í nógvum londum, um man skal læna bil, tá krevja útleigararnir, at lánarin er meiri enn 21 til 23 ár. Hetta verður kravt av tryggingar-



feløgunum hjá teimum, tí tey kenna hagtølini. Ikki er tað rúsdrekkakoyringin, sum er tann størsti vandin hjá hesum ungu fólkunum, tí tey ansa væl eftir ikki at missa koyrikortið, sum tey júst hava fingið.

Stórsti vandin er náttarkoyringin, hetta vísir uppgerð hjá Landslæknanum og hetta vita vit, sum arbeiða við hesum vanlukkum eisini.

Um náttina og tíðliga um morgunin eru tey móð og ikki væl fyri, eisini eru umstøðurnar ikki góðar at koyra í, tað er myrkt, og um tað hevur regnað, er nógv ørkymlandi endurskin á vegnum, eisini er tað ofta kaldari um náttina og tí hálari á vegnum. Mær vitandi eru bert tveir tímar náttarkoyring í samband við koyrifrálæruna. Tí fari eg at mæla til, at nýggja ferðslulógin fer at treyta nýggju koyrikortini so, at tey, sum júst hava fingið koyrikort, ikki koyra um náttina tey fyrstu árini.

Tað ber ikki til, at Føroyar sum ein mentað tjóð, og at vit sum ábyrgdarfull vaksin, kunnu lata so nógv ung lív og lagnur fara fyri skjeyti.

**Heimildir: Ársfrágreiðingar Landslæknans árini 1978 — 1993. Behandling af traumatiske hjerneskader og tilgrænsende lidelser. Sundhedsstyrelsen 1997 Polititsøðin í Havn**

**Havn Hin 20. januar 2000**
**Vinarligast**
**Høgni Djurhuus**
**Lækni**









# Fullveldið skal ikki kosta vælferðina

*Uppritið staðfestir, at landsstýrið skal samráða seg til eina avtalu við donsku stjónina, ið ikki minkar um vælferðina*

John Johannessen

Føroyar og Danmark skulu halda fram undir sama kongi. Danska krónan skal framhaldandi vera føroyskt gjaldoyra, eisini um Danmark fer upp í evropeiska gjaldoyrafelagsskapin. Men dómsvaldið, løgreglan, fólkakirkjan, flogferðsla og flest onnur mál skulu yvirtakast.

Hetta er, sambært upplýsingum, Sosialurin hevur fingið hendur á, ein partur av 39 síðu drúgva uppritinum til samráðingarnar við donsku stjórnina um ríkisrættarligu støðu Føroya. Sum vit skilja, er talan um eina stigvísa gongd móti fullveldinum.

Uppritið sigur, at føroyingar skulu hava evsta valdið í Føroyum, men sambært tí, vit hava skilt, stendur einki í tí um, at fólkatingsumboðini skulu avtakast. Ríkisumboðið skal avtakast, men í staðin skal ein føroyingur umboða Danmark í Føroyum.

Búskaparligi parturin í uppritinum er eftir øllum at døma ikki sørt veikur. Har er ikki víst á nakað ávíst modell til eina skiftistíð ella nakað líknandi. Tað einasta, staðfest verður í hesum parti er, at landsstýrið skal samráða seg til eina avtalu við donsku stjórnina, ið ikki minkar um føroysku vælferðina.

Fyri at tryggja virðið á føroyska gjaldoyranum - ið verður danska krónan - skal evran vera trygdin fyri gjaldoyra okkara, fara danir upp í evropeiska gjaldoyrafelagsskapin.

### Í uttanlandsnevndina týskvøldið

Formaðurin í uttanlandsnevndini, Hergeir Nielsen, fekk í gjár um trý tíðina seinnapartin handað uppritið frá landsstýrinum. Hetta var eftir fundin hjá uttanlandsnevndini, ið var fyrrapartin. Men fyri at limirnir í uttanlandsnevndini skuldu fáa uppritið so skjótt, sum møguligt, gjørdi hann av at kalla inn til ein eyka fund í uttanlandsnevndini eftir tingfundin, ið var lokin stutt áðrenn klokkan hálvgum seks.

Hergeir Nielsen segði við Internetsosialin beint áðrenn fundin, at meiningin við fundinum var, at limirnir í uttanlandsnevndini fyrst skuldu fáa uppritið handað, síðani skuldi møguleiki vera fyri at seta spurningar og møguleiki var eisini fyri kjaki um málið.

Formaðurin í uttanlandsnevndini segði seg hava skeitt í uppritið, og helt hann tað vera ógvuliga áhugavert.

Um uppritið leggur upp til breiða semju, vil Hergeir Nielsen ikki siga nakað um. Men hann sigur seg ætla at arbeiða eftir málsetningini um hjá samgonguni. Tað vil siga, at hann ætlar sær at arbeiða fyri, at endaliga samráðingaruppleggið skal innihalda orðingarnar úr samgonguskjalinum og frá løgtingssamtyktini.

Hergeir Nielsen sigur tó, at hann ætlar sær at fáa snikkað ráðgevingina til landsstýrið soleiðis saman, at talan verður um eitt upplegg, ið fær breiða undirtøku. Men um talan verður um undirtøku millum aðrar flokkar, enn samgonguflokkarnar, vil hann ikki siga.

– Eg fari at leggja meg eftir at arbeiða fyri, at endaliga uppskotið verður tað best møguliga fyri landið og fólkið, sigur Hergeir Nielsen.

### Ov stutt skotbrá

Sum skiltist á fleiri av limunum í uttanlandsnevndini eftir fundin týskvøldið, vóru teir ikki sørt ónøgdir við tíðarfreistina, teir fingu frá formanni nevndarinnar at seta seg inn í málið.

Eftir at hava handað limunum í uttanlandsnevndini uppritið, boðaði Hergeir Nielsen teimum frá, at næsti fundurin um málið skuldi haldast í dag klokkan hálvgum tíggju fyrrapartin. Hesum mótmæltu limirnir, men formaðurin helt fast upp á sítt.

Hetta halda fleiri av limunum í uttanlandsnevdini vera sera óheppi, tí tað gevur teimum ikki nóg góða tíð at seta seg inn í málið, áðrenn tað skal viðgerast. Tingfundur var nevniliga í



*Uppritið til uttanlandsnevndina er stemplað í trúnaði, og hetta ætla allir limirnir sær at virða*

***Tilgjørd mynd***

gjár, og limirnir í uttanlandsnevndini skuldu sjálvsagt bæði luttaka á fundinum og fyrireika seg til fundin.

Hergeir Nielsen ásannar, at tað sjálvsagt ikki ber til hjá limunum í uttanlandsnevndini at vera fyrireikaðir til at taka støðu í málinum, men sigur samstundis, at tað heldur ikki er meiningin.

– Á fundinum í dag fara vit at tosa saman um, hvussu málið skal viðgerast. Vit skulu finna eina arbeiðsætlan, sigur formaðurin í uttanlandsnevndini og leggur afturat, at limirnir tó eftir tveir dagar hava fingið eina hilling av, hvat málið snýr seg um.

# Strong tagnarskylda

*Allar síðurnar í uppritinum til uttanlandsnevndina um fullveldismálið eru stemplaðar í trúnaði, og hetta siga limir uttanlandsnevdarinnar seg virða*

John Johannessen

– Brævbjálvin við uppritinum og hvør einasta síða í uppritinum eru øll stemplað »í trúnaði« tí geri eg ongar viðmerkingar til málið.

Hetta eru greiðu boðini frá limunum í uttanlandsnevndini, tá vit royna at fáa viðmerkingar frá ymisku umboðunum í uttanlandsnevndini um málið um ríkisrættarligu støðuna, nú uppritið til samráðingaruppleggið er farið í uttanlandsnevndina til viðgerðar.

Størst áhugi hevur seinastu tíðina verið fyri, um møguleiki er fyri, at Javnaðarflokkurin fer at veita samgonguni sín stuðul í málinum. Men hóast formaður floksins, sum eisini er limur í uttanlandsnevndini, nú hevur fingið handað uppritið, vil hann einki siga, um møguleiki er fyri, at Javnaðarflokkurin fer at taka undir við einum samráðingaruppleggi, ið líkist uppritinum.

– Málið er givið mær í trúnaði, og tí geri eg ongar viðmerkingar til tað. Eg kann tó siga, at eg enn ikki havi nátt at lisið tað nóg væl, og tí havi eg sjálvur ikki tikið nakara støðu til málið, sigur Jóannes Eidesgaard.

Formaður Javnaðarfloksins ger púra greitt, at hann ætlar sær at virða stemplið, løgmaður hevur sett á ritið.

– Eg vóni tó, at løgmaður fer at loyva limunum í uttanlandsnevndini at ráðføra seg við tingbólkarnar um málið, tí annars ber ikki til, hjá flokkunum at hava nakra støðu til tað, sigur Jóannes Eidesgaard, og vísir á, at tingfólk sjálvsagt eiga at vera so mikið at sær komin, at tey halda málið í trúnaði, hóast tað verður viðgjørt í tingbólkinum.

Jóannes Eidesgaard vísir á, at málið um markið millum Føroyar og Bretland eisini varð handfarið í trúnaði, hóast bæði hann og Edmund Joensen ráðførdu seg við tingbólkarnar.

– Í tí málinum lak einki út, og vit fingu eitt gott úrslit, sigur Jóannes Eidesgaard.

Formaðurin í uttanlandsnevndini og hinir limirnir í nevndini, Sosialurin hevur tosað við, eru púra samdir við Jóannesi Eidesgaard um, at trúnaðarstemplið hjá løgmanni skal virðast. Men limirnir vóna tó, at løgmaður fer at loyva teimum at ráðføra seg við tingbólkarnar.

